# Sosialurin gongur ov langt í óruddinum

JÚSTINUS LEIVSSON EIDESGAARD

justinus@post.olivant.fo



Framhaldssøgan í Sosialinum, Føroya reinasta land, er á mangan hátt ein góð greinarøð, sum hevur kastað ljós á nógv órudd í landinum, og nú tykist sum um greinarøðin er farin av sporinum, og at teir báðir upphavsmenninir Álvur Haraldsen og Kári Mikkelsen ikki rættuliga vita, hvat teir vilja við røðini. Í staðin fyri at vísa á veruligt órudd og óhumsku minna fleiri av myndarøðunum um ódámligt dýnulyftarí. Eitt rustfrítt skiljiborð uttan fyri eina alistøð, er tað órudd?

Her í mínum nærumhvørvi í Elduvík, Oyndarfirði og á Hellunum vóru 18 myndir við í Sosialinum í gjár. Eg gjørdi mær ómak at hyggja eftir, og eg dugdi bara at síggja tvær av hesum 18, sum veruliga vístu órudd.

Nú rokni eg ikki við, at meiningin er við greinarøðini, at Føroya land skal gerast heilt kliniskt reint. Tað má verða pláss fyri virksemi og kreativiteti.

Eg defineri órudd soleiðis, at talan er um óbrúkiligar lutir, sum liggja og rekast og ongan góðan eiga.

Á Hellunum er víst órudd fram við einum húsaveggi. Eg veit ikki, um grammleikin hjá myndamanni og journalisti hevur verið ov stórur hendan dagin. Um myndamaðurin bakkaði tveir metrar og hevði eina vanliga linsu á fototólinum, so hevði ein nýmálað ruskbingja komið undan kavi. Hon er spent niður í betong, fyri at hon ikki skal enda úti á fjørðinum, tá ið hann slær niður úr Rættarhamri á útsynningi. Tað, at bert óruddið er avmyndað, tikið burtur úr einum samanhangi og ikki at tað liggur á einum kommunalum óruddsplássi, minnir ikki sørt um manipulatión.

Óruddið ella gomlu jarnlutirnir eru settir á ruskplássið, har teir hoyra heima og einaferð um vikuna ella so kemur bilur frá IRF og tekur hetta órudd burtur. Veldan, ruskplássið lýkur enn ikki allar treytir enn. Tað skal verða innhegnað, og ein persónur skal ansa tí og halda tað økið. Men hetta er ávegis. Plássið er planerað í summar, og nú vantar bert at gera arbeiðið liðugt. Niels hjá Harry á Strondum hevur evnað stykkið smotisliga til, og komandi ár verður tað fult lógligt, skulu vit trúgva myndugleikunum.

Nøkur dekk og nakrir oljudunkar eru eisini avmyndaði, og tey hoyra til virksemið hjá einum busstjóra her á Hellunum. Hvussu hetta kann flokkast undir, órudd dugi eg ikki rættiliga at skilja. Kanska Sosialurin kemur við eini nærri grundgeving.

Hellurnar er annars tiltikið fyri at vera ein ruddilig bygd, so kanska tit skylda okkum eina lítla umbering.

Sosialurin hevur hildið seg langt vekk frá mínum húsum á Hellunum tíbetur. Kanska einki var har sum kemur undir óruddsnálareygað hjá blaðnum. Annars hevur eitt gamalt rekatræ ligið í fleiri ár uttanfyri, og eg veit ikki ordliga, hvat eg skal brúka tað til, og tí er tað ein óruddskandidatur. Nú liggur ein gomul elmastur hjá SEV, sum skal bera eini vindmyllu, tá íð eg einaferð um stutta tíð havi fingið byggiloyvi. Minni lutir enn hesir eru komnir undir órudd í Sosialinum seinasta árið.

Í míni heimbygd Oyndarfirði hevur óruddspatruljan eisini verið á ferð, og eg standi spyrjandi. Ein føroyskur bátur niðri á havnarlagnum, sum ein tilflytari hevur ætlanir við, verður defineraður sum órudd. Tað er kanska vantandi skorðan, og at hann liggur á liðini, sum ger bátin til óruddskandidat. Lutir kring alistøðina, sum enn eru í brúki verða prentaðir í Sosialinum sum órudd.

Í Oyndarfirði er næstan einki órudd til longur. Í so máta er bygdin óinteressant. Tit skuldu vita fyrr og serliga, tá ið eg var smádrongur. Tá var stuttligt at leita í óruddinum. Tá vóru køstar allastaðni niðri í fjøruni. Nú hevur bygdin eitt fyrimyndarliga rikið ruskpláss, og tú sært onki sløðast longur. Fjøran og áin er gullrein.

Ein maður í Oyndarfirði ætlar at gera eitt úthús. Eini hús í bygdini verða niðurtikin, hann bjargar sær stórviðinum. Er nakað forgjørt í tí? Hendan myndin eigur ikki pláss í Sosialinum, fyrr enn viðurin er rotin og ónýtiligur, og tað verður hann tíverri ikki fyrr enn um nøkur ár.

Í Elduvík hava teir avmyndað broytina hjá mínum góða vini Poul Johannus Reyná. Hon var virkin í fjør og gróv í bygdini, og akkurát nú er hon í ólagi. At hon er eitt sindur rustað er neyvan nakað lógarbrot sum ger hana seka í at hava brotið umhvørvislógina.

Nakrir sekkir av kunsttøðum ella er tað sement liggja innpakkaðir á einum platti á matrikulnummariðnum hjá eigaranum, er tað órudd og um so er, kanska Sosialurin hevur eina meira nøktandi forklársing.

Sum sagt ein frálík greinarøð, men tit mugu gera tykkum eitt sindur meira greitt, hvat er órudd og hvat eru lutir, sum ikki eru í brúki akkurát nú, men sum verða brúktir aftur.

Dekningurin av óruddi í Elduvík, á Hellunum og í Oyndarfirði fær ug, um 16 av teimum 18 myndunum í Sosialinum vóru óprentaðar.



*Tað gekk ikki fram av myndarøðin, sum eg sá á Portalinum, at óruddið her á myndini liggur á tí almenna ruskplássinum á Hellunum, og at slíkt óbrennbart burturkast verður tikið burtur javnan*

# Tá sjálvt blaðstjórar skjóta journalistar

JÓN BRIAN HVIDTFELDT

Tíðindaleiðari, Kringvarp Føroya



**Ótrúligt at einasta sonevnda vinnublað í Føroyum hevur slíkan tørv á at verja sín vinnumálaráðharra, at blaðið brúkar oddagreinina til at skjóta niður aðrar journalistar og journalistiska fakið, sum blaðið annars burdi bygt sítt arbeiði á**

Í nýggjastu oddagrein fer blaðstjórin á Vinnuvitan í hernað móti journalistum, sum hann beinleiðis skírir at hava eitt endamál – nevniliga at fáa landsstýrisfólk frá. Og so letur hann annars upp fyri eini verjurøðu til frama fyri sínum vinnumálaráðharra. Tá hann nú er farin ígongd, so nýtir hann høvið til eisini at verja tey vinnulívsfólk, ið kundu hugsast at havt eitt lítið landsstýrisfólk í búkinum. So hevur blaðstjórin jú eisini kýnt øllum sínum kjarnulesarum og -lýsarum.

Lat meg siga tað beinanvegin. Tað er einki mál í sær sjálvum hjá einum journalisti at fáa ein ráðharra frá. Tað hevði Óli á Deild Olsen eisini vitað, um hann spurdi onkran journalist. Men hinvegin er tað ein skylda hjá einhvørjum journalisti at halda eitt vakið eyga við teimum, sum taka avgerðir vegna tað samfelag, vit liva í.

Ítøkiliga málið, sum hevur fingið Vinnuvitan at rudda oddagreinina til vinnuliga verjurøðu, er søgan um slógvið í Vági. Ein søga, sum sokallaða vinnublaðið í Føroyum millum annað skírir at vera "tunt soð", at "tevja blóð" og "at skriva rokning uttan vert." Nøkur fakta í málinum eru tó:

- at Sp/f Frystimiðstøðin hevur innfryst slógv uttan løggilding
- at slógv frá sp/f Frystimiðstøðini er endað á ES-marknaðinum
- at ES-løggáva krevur, at bara virki við løggilding kunnu innfrysta slógv

Um leiklutin hjá Johan Dahl er at siga, at hann er ein av stovnarunum, eigaranum og nevndarlimunum í sp/f Frystimiðstøðin. Hann sat í nevndini, líka til eftir at hann varð útnevndur landsstýrismaður, og hann eigur framvegis í fyritøkuni.

Sum landssstýrismaður í vinnumálum hevur Johan Dahl ábyrgdina av, at løggávan á vinnuøkinum verður hildin. Eisini kunngerðin um løggilding av virkjum. Hann hevur evstu ábyrgd av, at løggávan verður hildin. Tí er tað í síðsta enda hann, sum skal standa til svars fyri ES-myndugleikum, um tey seta spurnartekin við føroyska eftirlitið á økinum.

**Góða mamma**

Eftir at Kringvarpið hevur borið tíðindini um sp/f Frystimiðstøðina í Vági hava fyrst Johan Dahl og síðani Delta Seafood á Tvøroyri kært til Fjølmiðlanevndina. Tey siga seg ikki vera sloppin til orðanna í málinum. Og landsstýrismaðurin í vinnumálum kærir enntá fyri at vera vístur í slowmotion. Tað hava tey sjálvandi rætt til. Fjølmiðlanevndin er júst eitt amboð til at viðgera støður, har fólk halda seg hava fingið skeiva viðgerð av einum fjølmiðli. Tó kann tað tykjast eitt sindur løgið, at somu persónar, sum í prosessini als ikki ynsktu at tosa við Kringvarpið, enntá løgdu hornið á, nú kenna seg ikki at vera hoyrdar. Tað málið gongur sína gongd, og Kringvarpið ger sjálvandi sínar viðmerkingar til Fjølmiðlanevndina.

Fyri at venda aftur til blaðstjóran á Vinnuvitan. So er tað hugstoytt at einasta sonevnda vinnublað í landinum er farið at skjóta journalistar – og vit harafturat hava fingið ein landsstýrismann í vinnuvitamálum.

# Vit skilja teg, Jústinus

KÁRI MIKKELSEN

redaktiónsleiðari

ÁLVUR HARALDSEN

myndamaður, Sosialurin

Takk fyri viðmerkingina, Jústinus Leivsson Eidesgaard. Minnast vit rætt sendi tú okkum eisini eina heilsan, tá vit júst vóru farnir undir at vísa órudd úti um landið og rósti hesi greina- og myndarøð okkara fyri at vera eitt sera gott tiltak. Hetta skalt tú sjálvandi hava stóra tøkk fyri, eins og tú hesaferð eisini gert vart við, at greinarøðin á mangan hátt er góð.

Vit báðir undirritaðu vóru sjálvandi spentir upp á at hoyra, hvør viðmerking fór at koma, nú vit vóru á heimabeitinum hjá tær har norðuri. Tí at tú fór at gera vart við teg, ivaðust vit ongantíð í. Sótu nærmast og veddaðu í bilinum suður aftur um, hvussu skjótt vit fóru at frætta frá tær. Vit eru fullgreiðir yvir, at tað kann vera torført at síggja nakað sum órudd, tá ein hevur sæð so leingi upp á tað, sum tú ivaleyst hevur í hesum føri. Hetta er ikki bert galdandi fyri teg, men tey allarflestu. Tí skilja vit teg sjálvandi, men nakra umbering vegna Oyndarfjørð og Hellurnar, sum tú biður okkum at koma við, kemur tú at bíða til fánýtis eftir. Viðvíkjandi ruskplássi á Hellunum, so sóu vit einki, sum gjørdi vart við, at talan skuldi vera um eitt kommunalt ruskpláss.

Av góðum grundum vita vit ikki, hvussu tá sá út í Oyndarfirði undir tínum uppvøkstri, men óansæð óhumsku fyri 40-50 árum síðani, so forsvarar hetta ikki, hvussu viðurskiftini eru í dag.

Tú nevnir órudd uttanfyri húsini hjá tær, men vit hava nettup roynt at umgingið at avmynda órudd á øki hjá privatfólki ella har fólk búgva. Hinvegin áttu vit at hava sagt tær frá, so tú kundi bjóða okkum ein guidaðan túr í bygdunum, tí tað er altíð gott at hava staðkend fólk at hella seg til. Júst hetta fara vit at biðja teg umbera okkum fyri.

**Gjald fyri valgreinar**

Fram til kommunuvalið 11. november fer Sosialurin at taka gjald fyri valgreinar. Gjaldið er hálvur lýsingarprísur fyri t. e. 95 oyru + MVG fyri millimeturin. At rokna sum valgreinar eru allar greinar, sum valevni skriva - og geinar frá øðrum, sum blaðstjórnin metir sum valtilfar. Skipanin verður í gildi fram til kommunuvalið. Valgreinar skulu sendast við telduposti til post@sosialurin.fo - og tær skulu vera rættlisnar og harvið púra klárar at prenta.

**Blaðstjórin**